# YVIRLÝSING

## POLITISKU FLOKKARNIR GÓÐTAKA, AT ARBEIÐSPLÁSS VERÐA AVREIDD AV LANDINUM

### SAMGONGUFLOKKARNIR VIRÐA IKKI FAKFELØGUM SVAR UPPÁ FYRISPURNING

Tann 6. juli 2005 hava undirritaðu fakfeløg sent løgmanni og øllum landsstýrismonnum bræv, har vit vísa á óhepnu gongdina, har alsamt størri nøgdir av fiskinum fer ótilvirkaður av landinum.

**Vit hava í hesum sambandi m.a. víst á:**

- at tilfeingið í havinum sambært galdandi lóg er ogn Føroya fólks,
- at tað er skyldan hjá okkara politikarum at tryggja, at størst møguligur partur av fiskinum veruliga kemur føroyska fólkinum til nyttu,
- at ikki er rætt at fremja nakrar einskiljingar innan fiskivinnuna, so leingi støðan í samfelagnum er so vánalig,
- at tað er skyldan hjá landsins myndugleikum at boða frá, hvat ætlanin at gera, nú arbeiðsplássini alsamt fækkast í landi okkara.

Í skrivinum bóðu vit um fund við landsstýrið soleiðis, at hesin fundur kundi haldast beint eftir summarfrítíðina.

## HVØRKI LØGMAÐUR ELLA NAKAR AV LANDSSTÝRISMONNUNUM HEVUR SVARAÐ SKRIVI OKKARA.

Undirritaðu fakfeløg átala harðliga, at landsstýrisumboðini ikki so frægt sum hava svarað nevndu áheitan okkara.

Vit kunnu samstundis staðfesta, at eingin politiskur flokkur hevur rørt hond frá síðu fyri at tryggja, at arbeiðsplássini ikki verða avreidd av landinum. Eingin flokkur hevur sett fram nakað uppskot, sum skal tryggja, at ikki alsamt størri nøgdir av fiskatilfeinginum verður avreitt uttanlands, har fiskur okkara skapar arbeiði til túsundvís av hondum, meðan okkara limir ganga arbeiðsleysir.

Vit átala harðliga hesa líkasælu, sum okkara politikarar vísa teimum føroyingum, sum hava mist ella frameftir fara at missa arbeiði sítt m.a. orsakað av, at fiskurin fer ótilvirkaður av landinum.

Tórshavn, tann 26.10.2005

FØROYA ARBEIÐARAFELAG HAVNAR ARBEIÐSMANNAFELAG HAVNAR ARBEIÐSKVINNUFELAG

KLAKSVÍKAR ARBEIÐSMANNAFELAG KLAKSVÍKAR ARBEIÐSKVINNUFELAG